einfaldari

- ger tað einfaldari

Oktober 2012

# Samkomufundur



*Skitsa av 1. byggistigi, møtisalur*

Týskvøldið 11. september var samkomufundur í Lonini, har m.a. fíggjarstøðan og bygging av nýggjum samkomubygningi vóru á skránni. Umsókn um lán er send til peningastovnar, í sambandi við at ætlanin er at fara undir at byggja. Bygt verður í stigum, og fyrsta byggistig umfatar stoypiarbeiði og bygging av sjálvum møtisalinum.

### Trúgvin ger allan munin

Vit liva í einum heimi, her næstan alt kann vigast, mátast, kannast og forklárast. Okkara gerandisdagur handlar í mesta mun um tað, ið vit uppfata við okkara sansum og kenslum. Trúgvin handlar um "tað, sum einki eyga hevur sæð, og einki oyra hoyrt" (1. Kor. 2,9). Heimurin biður okkum hugsa kritiskt, so vit kunnu kontrollera og betra um okkara fysiska og psykiska umhvørvi. Bíblian lærir okkum, at tað er ómøguligt at toknast Gudi uttan trúgv.

Hetta er dagliga avbjóðingin. Í heiminum eiga vit at taka lut og gera mun, samstundis sum vit vita, at vit eru fremmand og útlendingar her á jørð. Lyklaorðið til hesa avbjóðing er trúgv. Øll, sum taka hesa avbjóðingina í álvara, vita, at tað er neyðugt at vera tilvitað um trúnna.

Ótilvitað vendist hugur okkara til tað, sum vit síggja. Í Hebrearabrævinum kapittul 11 lesa vit um týdningin av trúgv í lívinum hjá eini røð av Harrans tænarum. Fyri allar hesar Harrans tænarar var galdandi, at trúgvin gjørdi allan munin. Um Móses stendur, at "hann helt á, sum hann hevði sæð hin ósjónliga" (Hebr. 11,27). Lat okkum, sum tað stendur í Markus 9,24, rópa til Harran: "Eg trúgvi – hjálp vantrúgv míni!"



*Jóhan*

## HENDINGAR & TILTØK

### Kvinnustevna á IKTUS




IKTUS sendir regluliga talur frá Lívdini, og hendan mánaðin sendir IKTUS upptøkur frá kvinnustevnuni 2012 á Zarepta. Miriam Vang, Miriam Rasmussen, Andrea á Roykheyggi o.fl. tosa. Byrjað verður hósdagin 4. okt.

IKTUS sendir mikudag til leygardag kl.11:00, 16:00, 21:00 og 02:00. Sunnudag frá kl.14:30 og 21:00 verður endursent frá vikuni. Sí skránna og les meira á www.iktus.fo ella Facebook/Iktus

### Til lukku við barninum

21. august fingu Fríða og Martin Sivertsen ein son. Hann vigaði 4.120 gr. og var 54 cm langur. Hann hevur fingið navn og eitur Jákup Martinsson Sivertsen.



5. september fingu Aleksandra og Rani Skaalum ein son. Hann vigaði 3.950 gr og var 52 cm langur.



16. sept. fingu Mirjam Reinert Olsen og Marni Olsen eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3.490 gr.



## Christmas Child 2012



Sunnudagin 28. oktober er seinasta freist at lata skógvaeskjur inn til Christmas Child tiltakið í Føroyum.
Hvørt ár verða 7-8 milliónir skógvaeskjur latnar børnum í 95 londum. Sjálvboðin fólk og felagsskapir í USA og fleiri evropeiskum og skandinaviskum londum savna eskjurnar.
Eskjurnar í ár fara til Rumenia.

## Heilsan úr Kambodja



Brot úr heilsan frá Duritu og Paula Djurholm, sum virka fyri Harran í Kambodja saman við børnunum Jóhan og Gunnvá.
-Vit virka út frá Siem Reap Ministry, hvørs endamál er at vinna menniskju ígjøgnum m.a. samkomuarbeiði, húsvitjanir, skúlagongd, heilsuhjálp og menning innan landbúnað. Okkara uppgávur eru innan fyriskipan/umsiting, húsvitjanir, boðan av Orðinum og ráðgeving. Pauli hevur ábyrgdina av edv á skúlanum.
Okkara uppgáva er at kunna stuðlar og onnur áhuga um arbeiði her, soleiðis at fólk kunnu síggja hvat fyri arbeiði verður gjørt, og hvørjir tørvir eru. Á facebook-bólkinum Siem Reap Ministries og siemreapministry.org ber til at fylgja við arbeiðnum.
Takk til øll tykkum, sum stuðla okkum í bøn og fíggjarliga.

*Heilsan Durita og Pauli*

## Arnfinn Kithler deyður



Mikudagin 5. september andaðist Arnfinn Niclasen, vanliga nevndur Arnfinn Kithler, 56 ára gamal.
Arnfinn doyði í Grønlandi. Hann var har saman við øðrum í sambandi við byggingina av nýggjum leguhúsi. Síðan fór hann við trúboðanarbátinum Juvel II, sum vitjar bygdir í Grønlandi. Hann andaðist umborð á Juvel II. Vit minnast Arnfinn við takksemi.

## Njál Djurhuus á GLS



Altjóða leiðarastevnan The Global Leadership Summit verður í Norðurlandahúsinum dagarnar 11. og 12. januar 2013.
Fyri fyrstu ferð á GLS í Føroyum verður ein live-samrøða á skránni. Tað er kendi føroyingurin í Norra Njál Djurhuus, offiserur hjá Frelsunarherinum, ið verður gestur á GLS.
Njál hevur saman við konu síni Ernu tænt sum offiserur í Frelsunarherinum í 50 ár. Njál og Erna hava halgað sítt lív at tæna menniskjum á lívsins skuggasíðu. Njál verður við á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum. Ein samrøða verður við hann, har hann fer at greiða frá og geva víðari av sínum mongu leiðsluroyndum. Til ber at melda seg til á www.gls.fo

## Bønarløtur í Lonini

Týskvøld kl. 20.00 eru bønarløtur í Lonini oman Hoydalar 28. Triðja hvørt týskvøld eru kyknubólkar.

**Skráin fyri týskvøldini oktober 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Týskvøldið | 2. oktober | Bønarløta |
| Týskvøldið | 9. oktober | Bønarløta |
| Týskvøldið | 16. oktober | Kyknubólkar |
| Týskvøldið | 23. oktober | Bønarløta |
| Týskvøldið | 30. oktober | Bønarløta |

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt



Høgni

### Sunnudagin 7. oktober

Familjumøti kl. 10.30: Leikur v. fólki frá Lívsins Orði

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Ger trúgvin mun
Talari: Høgni Johannesen

### Sunnudagin 14. oktober

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Ger trúgvin mun

Talari: Símun Absalonsen



Grímur

### Sunnudagin 21. oktober

Familjumøti kl. 10.30: v. Grímur Poulsen

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Ger trúgvin mun

Talari: Jenis av Rana

### Sunnudagin 28. oktober

Familjumøti kl. 10.30: Um Christmas Child pakkarnar

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Ger trúgvin mun

Talari: Hanna Andreasen



Jenis

### Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00



Hanna

* Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*